Álit

í

løgtingsmáli nr. 63/2023: Uppskot til løgtingslóg um at menna nýggja kt-skipan til barsilsskipanina

Landsstýriskvinnan í umhvørvismálum, Ingilín Didriksen Strøm, hevur lagt málið fram 25. januar 2024, og eftir 1. viðgerð 13. februar 2024 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 29. februar 2024.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við KT-felagið og landsstýriskvinnuna í umhvørvismálum, Ingilín Didriksen Strøm, saman við barsilsskipanini.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

TAKS hevur undir viðgerðini upplýst, at henda verkætlanin snýr seg um at flyta barsilsskipanina frá, at alt verður gjørt manuelt og eini skipan har tøknin er frá 80'unum til eina nýmótans fleksibla og meira brúkaravinarliga skipan.

Metingin um nøgd av neyðugum arbeiðstímum at fremja verkætlanina, sum tilboð eru komin inn uppá, er gjørd útfrá royndum hjá TAKS við líknandi broytingum. Arbeiðið er boðið út, og veitari er funnin. Arbeiðið skal gerast í bitum, við tað at verandi skipan verður endurnýggjað, og í tøttum samstarvi við tey í barsilsskipanini, ið hava dagligu umsitingina um hendi. Rakstrarkostnaðurin verður ikki munandi øðrvísi enn í dag, men at gera broytingar í skipanini verður bíligari og lættari.

Viðvíkjandi útbjóðingarháttinum metir TAKS, at hetta er ein góður arbeiðsháttur, tá ið ein skipan skal endurnýggjast, og serliga verður eftirlitið við, at fíggingin heldur, lættari, samstundis sum tað slepst undan, at TAKS sum keypari verður læst at fyritøkuni, sum skipanin er keypt frá. Hetta er ein útbjóðingarháttur, ið verður nógv brúktur í dag.

KT-felagið hevur undir viðgerðini upplýst, at tað metir tað vera gott, at verkætlanin er boðin út millum føroyskar fyritøkur, men metir eisini, at spurnartekin kann setast við arbeiðsháttin, har mennarar úr vinnuni fara at arbeiða í TAKS, ístaðin fyri at útboðið fer út til eina vinnufyritøku. Felagið metir, at hetta er eitt rák, sum tykist vera innan KT í løtuni, og felagið setir spurning við, um tað er rætti háttur at byggja upp førleikar í vinnuni.

Sjálvt arbeiðið er m.a. skipað við einum stýrisbólki, har Umhvørvismálaráðið er umboðað, ið millum annað tekur avgerðir um broytingar í verkætlanini.

Arbeiðið verður sum áður nevnt gjørt í pørtum. Nevndin hevur fingið upplýst, at broytingar í útgjaldinum av barsilsgjaldinum til frameftir at verða síðst í mánaðinum kann setast í verk innan ein mánaða eftir, at arbeiðið er byrjað.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 20. mars 2024

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	